KT-FELAGIÐ

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Tórshavn 23. august 2022

## Hoyringssvar

KT felagið hevur fingið uppskot til kunngerð, um at seta í gildi § 4 í lóg um talgilda samleika, til hoyringar.

KT felagið fegnast um talgildu framgongdina. KT felagið tekur undir við, at tað verður kravt av almennum stovnum og partafeløgum at nýta Talgilda Samleikan, soleiðis at brúkarin hevur eina kenda inngongd til talgildar tænastur. Tó ynskir felagið at gera vart við, at neyðugt er at tryggja, at kostnaðurin av at nýta Talgilda Samleikan ikki gerst ov høgur.

KT-felagið gjørdi áðrenn summarfrítíðina Landsstýrismannin í Fíggjarmálum, sum varar av Talgildu Føroyum, varugan við, at tað er ov kostnaðarmikið hjá privatum fyritøkum at gagnnýta Talgilda Samleikan. KT felagið vísti á, at samfelagið fær ikki fullan ágóða av íløguni í Talgildan Samleika, um privatar tænastur ikki knýta sínar tænastur at Talgilda Samleikanum.

Vinarliga
KT-felagið

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo